# Kjak

Ingibjørg Egholm & Jóanes N. Dalsgaard

# Skúlin fyri øll?

Í hesi deiligu jólatíð, sum nú er farin afturum, hava vit, sum flest onnur verið saman við familju og vinum, og sum ikki einaferð fall tosið á fólkaskúlan, dygdina á skúlanum og PISA.

Vit, sum búgva Føroyum, gjalda nógvan skatt, so nógvan, at ikki er so sera nógv eftir at rutta við, tá ið allar útreiðslur eru goldnar. Millum annað gjalda vit nógvan skatt til til fólkaskúlan, fyri at okkara børn kunnu fáa eina góða skúlagongd. Men fáa tey tað? Tað halda vit ikki. Vit eru als ikki nøgd við tað tilboð um læring og menning, sum okkara børn fáa í føroyska fólkaskúlanum.

Seinnu árini er nógv tosa um skúlan fyri øll. Vit taka av fullum huga undir við tankanum um, at skúlin skal kunna rúma flest øllum børnum fysiskt eins væl og pedagogiskt. Men hóast skúlin fyri øll er veruleiki í tann mun, at øll børn vera sett í sama skúla, so er skúlin ikki fyri øll tá umrøður pedagogiska innihaldið og fakligu avbjóðingarnar.

Vit eiga eina dóttir, sum er 4 ár. Hon dugir allar bókstavirnar og er so smátt farin at stava orð. Hon dugir øll tølini og er so smátt farin at leggja saman, so nógv sum rúmast á hondunum. Hon tosar føroyskt og danskt, og spælir sær við enska málið, sum hon hoyrir í sjónvarpi og tónleiki. Heldur hon fram sum nú, so er hon komin væl áleiðis við at at lesa, skriva og rokna, umframt at tosa danskt og enskt tá hon byrjar í 1. flokki. Verður støðan til ta tíð, sum hon er nú, so hevur skúlin millum lítið og einki at bjóða henni tá, við teirri grundgeving, at hon er 'ov væl fyri'. Hon verður tískil at bíða við at læra nakað nýtt, inntil hon kemur í ein flokk, har lesiætlanin samsvarar við hennara støði.

Vit hava uppliva hetta sama við tveimum eldri børnum. Tey eru farin í skúla, við góðum útgangsførleikum í ávísum fakum, og kanska slakari í øðrum. Men ístaðin fyri at skúlin møtir einstaka barninum, har tað er, og gevur tí hóskandi avbjóðingar í øllum fakum, so endar alt í eini gráari súpan, har øll skulu læra tað sama, til somu tíð.

Skúlatilboðið er gjørt til 'miðalbarnið', men miðalbarnið finst bert á pappírinum og ikki í veruleikanum. Veruleikin er heldur tann, at einki barn í føroyska fólkaskúlanum fær eitt tilboð, sum er lagað júst til menningarstøðið og tørvin hjá tí. Ístaðin fáa øll somu gráu súpan. Og okkara fatan er, at tað í stóran mun eru teir 'góðu' næmingarnir, sum eru við sviðusoð.

Tá tað kemur til skúlaskap, er tað heilt forboðið at tosa um, at býta næmingarnar sundur eftir førleikastigi heldur enn aldri. Frágreiðingin vit fáa, um hví so er, hevur ofta nakað við trivnað at gera. At tað ikki ber til at býta børnini upp eftir hvat tey duga, tí at vit so fáa A-lið og B-lið. Og at tað skapar trupulleikar fyri B-liðið. Vit hava so sera ilt við at góðtaka hesa frágreiðing.

Innan ítrótt og tónleik verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at menna tey bestu heilt frá at tey eru smá, men í fólkaskúlanum mugu næmingar, sum hava lætt við at læra og sita og hungra eftir vitan, bara bíða eftir, at pensum er komið upp á teirra støðið. Bygnaðarliga er ikki pláss fyri at menna hesar næmingar so tey kunnu nýta sítt potentiali til fulnar. Skúlaskapurin er so fast stappaður inn í skema og lesiætlanir at tað, sambært fleiri lærarum, vit hava tosa við, er torført ella næstan vónleyst at stimbra hesar næmingar til fulnar innanfyri karmarnar av verandi skúlaskipan.

### Nýhugsan kostar einki

Vit halda at politiski myndugleikin fyrst og fremst og síðani skúlans leiðslur skulu tora at hugsa nýggja tankar. Politiski mynduleikin skal hugsa um, hvat er hansara uppgáva, tá ið talan er um fólkaskúlan. Løgtingið hevur samtykt fólkaskúlalógina, sum sigur endamálið er at stimbra allar næmingar til eina fjølbroytta persónliga menning. Hetta endamál verður ikki rokkið í dag og tí halda vit, at politiski myndugleikin eigur at endurskoða og nýhugsa fólkaskúlan.

Nógvir møguleikar eru, um tað verður latið upp fyri orðaskifti um tað. Vit halda at brúk er fyri einum grundleggjandi orðaskifti um fólkaskúlan og einari uppgerð við tann undirvísingarhátt, sum er í dag. Hesin undirvísingarháttur sampakkar týðuliga ikki við okkara børn og tað halda vit at PISA-úrslitini eru ein týðulig ábending um.

Ein vegur fram var kanska, at skúlaleiðslurnar, í eini menningartilgongd, fingu fríari teymar til at skipa undirvísingina alternativt til tað, sum nú er galdandi. Fortreytin fyri at hetta skal bera frukt er sjálvandi, at skúlaleiðslurnar hava hugflog og dirvi til at hugsa nýtt og øðrvísi, fyri harvið at gagnnýta teir møguleikar sum eru, fyri at gera skúlagongdina hjá tí einstaka næminginum meira spennandi og mennandi.

Tað eru ikki altíð pengarnir sum avgera, men eisini dirvið og hugflogið til at royna nakað nýtt og øðrvísi. Og vit eftirlýsa dirvi, hugflog og handlikraft, bæði frá skúlaleiðslunum og frá politiskari síðu.

---



Jørleif Kúrberg
*ferðaleiðari*

Ferðavinnan

# Set Smyril í skotlanssigling!

Hetta er skrivað í bestu meining og verður vónandi móttikið á sama hátt.

Eg havi í mong ár arbeitt innan ferðavinnuna og havi sæð, hvussu dugnaloysi er um at beina fyri hesari vinnu. Ferð aftaná ferð verða nýggj fólk sett í starv at leiða hesa vinnu. Dugnaleys fólk. Ofta onkur, ið stendur onkrum politikara mær. Og skilið hevur verið hareftir.

Nú byrja vit spakuliga, ógvuliga spakuliga at vakna. Nú síggja vit, at her er ein rættiliga stór vinna um at gleppa okkum av hondum. Eitt hálvbýtt segði einaferð í útvarpinum, at vit skuldu leggja okkum eftir at fáa ríkfólk at koma higar! Hann náði meg. Tað eru avgjørt ikki tey, ið leggja pengar eftir seg (tí eru tey rík), men heldur ein norskur, enskur ella danskur pensionistur.

Tað sita nógv dugnalig, ung og eldri, fólk kring landið, ið fegin vilja arbeiða við ferðavinnuni, t.d. á ferðaráðnum, kunningarstovunum, ferðaleiðarar, og fólk, ið skipa fyri ymsum tiltøkum. Lat hesi sleppa framat og hjálp teimum.

Lat ikki øll bert koma til Havnar, men fái tey út um alt landið. Lætt um hjá teimum, ið vilja vinna nøkur oyru upp á ferðafólk. Ger tað lætt hjá fólki, ið vilja bjóða ein drekkamunn, ella eina máltíð. Sjálvandi skal skil vera í. Men máti skal vera við. Skal tað vera so, at konan í Sumba ella í Fugloy noyðist at fáa sær køk og útgerð fyri 100 000 kr fyri at geva ferðafólki ein kaffimunn og eina pannukøku, so er onkur, ið onki hevur skilt.

SET SMYRIL Í SKOTLANDSSIGLING.

Ger tað lætt og bíligt at koma til landið.Set Smyril í skotlandssigling. Eg havi tosað við fleiri skilafólk í Suðuroy um hetta. Øll halda hugskotið vera frálíkt. Men letur hetta seg gera uttan at gera fortreð fyri Suðuroyingar? Nei, men ógvuliga lítið fortreð. Hvussu? Jú, Smyril fer hósmorgun kl. 6 av Tvøroyri. Av Havnini kl. 9 til Tvøroyrar. Av Tvøroyri til Scrabster í Skotlandi kl. 12. Í Scrabster kl. 21. Úr Scrabster kl. 23. Og verður aftur á Tvøroyri kl. 8 fríggjamorgun, og kann so fara aftur í vanliga sigling.

Suðuroyggin missir EIN túr, men Suðuroyggin fær beinleiðis samband til ein stóran marknað, bæði hvat viðvíkur ferðafólki og ikki minst inn og útflutningi.

Sjálvandi skal ferðaseðilin úr Bretlandi verða galdandi til Havnar. So fara nógv ferðafólk í land í Suðuroy, og tey fara so at ferðast har nakrar dagar, ella tey steðga nakrar dagar á veg úr Føroyum. Suðuroyggin er jú so framúr vøkur, og ongastaðni er læ ttari at koma nær stórfingnari føroyskari náttúru enn í Suðuroynni.

Lyndið í Suðuroyingum er sum gjørt til ferðavinnu: Fyrikomandi, blíð og vinsæl.

Føroyingar fáa eisini frálíkar møguleikar til so mangt: Útflutning til stóra bretska marknaðin. Ferðast í Skotlandi, Onglandi, Walesog Írlandi. Og ikki at gloyma: Tað er nógv bíligari at ferðast víðari út í heim um Bretland, enn tað er um Danmark.

Sambandið er gott úr Scrabster til Orknoyar og til Hetlands, har vit, ikki minst Suðuroyingar, hava so nógv vinfólk.

Tað ljóðar eisini, at North Link, ið rekur ferjusamband í Skotlandi, ætlar at fáa í lag eina rutu millum Scrabster, Orknoyar, Hetland og Noreg. Aftur ein møguleiki.

Men. Lat ikki løtuvinning stýra hesum, sum so mongum øðrum, vit hava roynt. Hav prísirnar á einum støði, ið fær fólk at siga:" Hatta vilja vit royna aftur". Ger ikki sum matstovan Havn, ið tók 375 kr. fyri 3 kaffi og 3 smáar gularótakøkur. Tað fekk eg, og tí havi eg verið 2 ferðir á hesi matstovu: Fyrstu ferð og seinastu ferð.

At enda: Hugsið væl um møguleikan við Smyrli og sambandinum til Bretlands. Smyril skal sjálvandi ikki sigla við undirskoti. Men tað fer hann neyvan, um hesin møguleikin verður veruleiki.